# El-talvur og annað til føroyska marknaðin

**El-talvuvirkið hevur rundað tey 25 árini og veitir eltalvur, stýri- og krafttalvur og annað til føroyska marknaðin**

El-talvuvirkið varð stovnað í 1983 og gongur sostatt á 26. ári.

Eyðun Hansen er stjóri á virkinum, sum hann sjálvur stovnaði í 1983, og í dag eru 14 fólk í starvi á El-talvuvirkinum.

### Til føroyska marknaðin

- Vit framleiða stýri- og krafttalvur til føroyska marknaðin. Í høvuðsheitum er tað til skip, virkir og almennar bygningar, ið vit frammleiða til. Vit projektera og installera talvur, og framleiða automatiskar styringar, generatoranlegg v.m. sigur Eyðun Hansen, stjóri og stovnari av El-talvuvirkinum.

### Verkstaður

- Vit hava eisini elektromekaniskan verkstað. Vit umvæla generatorar, elektromotorar og vatn-, lensi- og hydraulikkpumpur, og gera annars tað, sum slík verkstøð fáast við, sigur Eyðun Hansen.

### El-tænasta til skip og virkir

Nógv av arbeiðinum hjá El-talvuvirkinum fer fram umborð á skipum og á virkjum, og er tað umvæling av talvum, stýringum og øðrum, og tað eru elektrikarar, ið taka sær av hesum arbeiðinum.

### Expo er marknaðarføring

- Vit eru við á Fish Expo, tí hetta er marknaðarføring. Til ber at tosa við møguligar kundar, og eisini samstarvsfelagar. Vit kunnu t.d. koma á tal við útlendskar fyritøkur um keyp og sølu, vitan og møguligt samstarv. Hetta er gott høvi at koma á tal við fólk. Tiltakið er skipað so, at ein fundast ein hálvan tíma við hvønn luttakara, so ein kemur skjótt ígjøgnum allan skaran, og so kann ein møguliga tosa nærri seinni, sigur Eyðun Hansen.

Hann metir hetta vera góðan møguleika at koma í samband við fólk.

- El-talvuvirkið bjóðar seg fram, sigur Eyðun Hansen, ið metir, at tað er av týdningi, at fylgt verður upp seinni, og at samskifti eftir tiltakið er av stórum týdningi, um nakað skal spyrjast burturúr.



